Óli Jacobsen
olijacobsen@post.olivant.fo





*Jakku og Anna Malena saman við synum sonin Jóannes. F.v. Jákup Monrad, Andrass og Símun Dávur*

tá ið teir fóru at draga, brendi hann á av útsynningi. Báturin fór runt av eini hvirlu. Tríggir menn umkomust. Millum hesar var Símun og 14 ára gamli sonurin Joen Fredrik. Jakku var við sama báti, men slapp á kjøl saman við beiggja sínum Dávur.

Jóin var har í húsinum eini tvey ár, áðrenn tey giftust í 1913. Hann var tá 21 ár, og hon var 31.

Jú, Jóin dámdi sera væl at vera í Føroyum líka frá fyrsta degi, hann kom higar. Tað var skjótt, at hann tosaði fullkomiligt føroyskt. Ja, hann gloymdi so at siga tað íslendska. Hann dugdi bert onkur íslendsk orð, tá ið hann fór til Íslands at fiska, men hann kom skjótt eftir tí. Men hann dugdi kortini ikki betur íslendskt enn aðrir føroyingar, sum komu til Íslands.

Jú, hansara føðiland gjørdist Føroyar, og hann kendi seg fullkomiliga sum ein føroying. Hetta mundi hann takka manninum við tí síða skegginum fyri, hann sum var so góður við børn, ein sannur barnavinur.

Gud forláti mær. Tað var ikki lætt hjá foreldrunum at lata Jóin frá sær. Men hungur er eitt beiskt svørð. Tey búðu á einum neystalofti.

## Sá ikki foreldrini aftur

Jóin var elstur av fleiri systkin. Tey vóru ikki øll fødd, tá ið Jóin kom til Føroya.

Geila Jóannes kendi tey væl. Hann var altíð inni hjá teimum, tá ið teir vóru í Íslandi. Tað var akkurát sum at vera heima inni hjá teimum. Ein dóttir kallaðist Alfrida. Hon átti einki barn. Dagmar átti heldur einki barn. Alfons var ógiftur. Kanska var Engelbreth giftur. Hann var í hvussu er trúlovaður, tá ið Jóannes kendi hann. Torbjørg var gift. Tey búðu í Vestmannaoyggjunum, men hon flutti til Reykjavíkar tá hon fór frá manninum, sum var dani. Hon giftist upp aftur við einum íslendingi.

Jóin sá hvørki pápan ella mammuna aftur. Mamman hevði ynskt at síggja Jóin aftur, áðrenn hon doyði. Hon hevði sent boð um hetta við einum føroyskum skipi. Eina ferð vóru teir noyddir at liggja beint uttanfyri, har mamma hansara búði. Men hendan dagin viðraði so illa, at tað lat seg ikki gera at fara í land. Tá var pápin deyður.

## Gjørdist góður skipari

Beiggjar hjá Jóin komu higar. Alfons var her á Húsum ein heilan vetur. Hann gjørdi eisini nyttu fyri seg, gjørdi veg og hampaði um húsini.

Jóin tók skiparaprógv, og hann kom longu at føra skip 21 ára gamal. Hann var ein arbeiðandi og dugandi maður.

Jóin flutti av Húsum til Klaksvíkar í 1928 ella 1929. Hann átti hús norðuri á Stongunum.

Jóannes hevði sett nakað av peningi í, tá ið Jóin keypti Sigurfari, einar kr. 3.000, sum var nógvur peningur tá. Skipið kostaði kr. 13.000. Hetta var í 1926. Jóin rindaði hetta aftur við at lata Jóannes hús síni á Húsum.

Jóin keypti so motorbátin »Kunoynna«, tá ið hann kom til Klaksvíkar. Hann førdi »Albert Victor« í 1917, og í 1918 var hann bestimaður við honum. Hann førdi »Livingstone« í 1919 og 1920, og hetta seinna árið var Jóannes við honum.

Jóin førdi skip í 1922/23 og í 1924 førdi hann »Zion«. Í 1925 førdi hann »Sigurfari,« í 1926 førdi hann »Titanic«. Í 1927 keypti Jóin Sigurfari, sum i 1929/30 fekk motor.

Í 1933/34 kom Jóin sjúkur aftur úr Íslandi. Hann fór niður men kom aftur ólekiliga sjúkur. Jóin doyði í november 1934, bert 41 ára gamal.



*Jóin vaks upp saman við Geila Jóannes. Her sæst Jóannes og konan Frida. Tað er fyrst og fremst Jóannes fyri at takka, at henda søgan kann skrivast*



*Jóin og Johanna Sofía*

## Børnini

Jóin og Jóhanna Sofíu fingu sjey børn:

1. **Joen Sofus Fr. Sigurðsson.** Giftist við Kathrinu Mariu S. Matras úr Klaksvík. Tey fingu sjey børn. Hann var formaður á útróðrarbáti og var ein fiskiklógv.

2. **Sigurð Herluf Sigurðsson** f. 1915. Giftist við Matgrethe Solvej Poulsen av Eiði. Tey fingu átta børn. Sigurð var formaður á útróðrarbátinum Brandi, sum hann átti saman við beiggjanum Haldór.

3. **Alexander Frits Sigurdsson** f. 1916. Giftist við Onnu Petrinu Hansen úr Sørvági. Kendur sum skipari á Karin K, farmaskipinum hjá Kjølbro.

4. **Olaf Sigurdsson** f. 1919, giftur í 1941 við Jacobinu Mellemgaard. Tey ættleiddu eitt barn. Hann sigldi nógv við trolara.

5. **Haldór Imsland Sigurðsson** f. 1920. Giftur við Onnu Sofíu Gásadal. Fingu trý børn. Sigldi eisini við trolara.

6. **Ingolfur Fritjof Sigurdsson** f. 1921. Giftur við Hansinu Joensen úr Fuglafirði. Var smiðjumeistari á Stórubeding í Klaksvík. Tey fingu 5 børn.

7. **Karen Lydia Sigurðsson** f. 1926. Gift við Leivi Jensen, hjá Gøtu Pola. Tey fingu fýra børn. Lydia er einasta av systkjunum á lívi.

Sum tað sæst er nógv ætt í Føroyum eftir Jóin. Hon hevur eisini verið við til at menna føroyska samfelagið. Sum eitt dømi av mongum, kann nevnast, at ein abbasonur er Terji Sigurðsson, júst nú semingsmaður á almenna arbeiðsmarknaðinum. Ein annar royndur semingsmaður er eisini Alfred Petersen, langabbasonur Jóin. Ein beiggi Terja var Tórleif, kendur formaður í fótbóltssambandinum.

Men fyrst og fremst er hetta ein søga um, hvussu fólk komu hvørjum øðrum við, og hvussu stórt hjartalagið var, at tey uttan at himprast kundu taka sær av einum fremmandum barni fyri at geva tí eitt betri lív.



*Henda myndin av Húsum er frá umleið 1900. Jóin kom í næstuttasta húsið frá vinstru til foreldrini hjá Jakku, og fór til uttasta hús til høgru hjá Jakku og Onnu Malenu*

**Komandi partur**

Í komandi parti verður greitt frá tveimum dramatiskum lagnum undir seinna heimsbardaga, nevniliga Arna Petur og Johannes Nicolajsen